## 1 ár gjørdist til 16

Niels Stóra og Jákup á Dul høvdu hitt hvønn annan nakrar ferðir, áðrenn samstarvið teirra millum veruliga byrjaði. Seinni varð Niels so settur í starv her.

At fara til Íslands var kortini ikki ókent fyri Niels. Hann hevði verið har nakrar ferðir í samband við tær kristnu barnalegurnar sum verða fyriskipaðar á einum staði sum eitur Ástjørn.

Her hava fólk frá Brøðrasamkomuni í Føroyum hjálpt til á legunum, m.a. Niels sjálvur og kona hansara, Andrea sum er dóttir Arnstein Niclasen í Havn.

- Vit vóru saman her eini tvey summur, og so avgjørdu vit at flyta til Íslands, fyri líkasum at vita um vit fóru at trívast her.

- Vit ætlaðu bara at vera her í eitt ár, men nú hava vit verið her í samfull 16 ár!, staðfestir Niels.

í útnyrðingspartinum av landinum. Hetta er samstundis ein marknaðarbýur við grannalandið Ungarn.

Høvuðsstaðurin Bucarest er eisini ein áhugaverdur býur í hesum sambandi, men trupulleikin er bert hann, at leiguprísirnir har eru sera høgir.

- Tað vísir seg tí at vera trupult at finna tey røttu hølini í hesum býnum beint nú, sigur Niels Stórá.

At tað yvirhøvur ber til at fara undir handilsligt virksemi so langt frá heimlandinum er bert orsakað av einum: Tað veldst alt um fólkið ein hevur rundan um seg.

Men sum skilst á lagnum eru tað júst slík fólk, sum Niels og Jákup hava í sínum hópi!

### Spurningur um inntøku

Hesin nýggi handilin í Oradea í Rumenien er kortini ikki fyrsti handilin í hesum partinum av Europa.

Í november mánaði í fjør lótu teir upp fyrsta handilin í Bulgarien. Men hetta verður ikki tann einasti – og seinasti.

At teir í fyrstu syftu bert lótu tann eina handilin upp her var mest fyri at fáa nakrar royndir við, hvussu umstøðurnar eru í landinum eru.

- Vit ynsktu m.a. at vita, hvussu tað var at fáa vørurnar avgreiddar í tollinum, hvussu viðurskiftini vóru við flutningi og onnur viðurskifti, sum hava týdning fyri okkum, sigur Niels.

Teir hava stórar ætlanir í hesum økinum, og vænta at hava einar 20 handlar her um eini 4-5 ár.

Í Eystrasalti – tað er: Letland, Lithauen og Estland – hava teir í løtuni 18 handlar, og tá hetta árið er at enda komið er talið vónandi vorðið enn størri.

- Alt er ein spurningur um inntøku. Ofta er støðan hon, at inntøkurnar eru í høvuðsstaðnum og teimum stóru býunum.

- Skal ein út í provinsina, krevur ein at vera bæði tolin og varin, sigur Niels Stórá.



*Her í norðara parti av Rumenien liggur býurin Oradea. Her lata teir upp fyrsta handilin í november mánaði*



# Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðsmannafelag skrivað sáttmála um portørarnar

**Havnar Arbeiðsmannafelag og Fíggjarmálaráðið skrivaðu undir nýggjan sáttmála um arbeiðsøkið hjá portørum og ambulansustarvsfólki. Hetta stendur í tíðindaskrivi frá Fíggjarmálaráðnum í dag. Har verður eisini staðfest, at teir einans kunnu gera ein sáttmála á hvørjum arbeiðsøki**

SÁTTMÁLASEMJA

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðsmannafelag undirskrivaðu í dag sáttmála um lønar- og arbeiðsviðurskifti hjá portørum og ambulansustarvsfólki. Nýggi sáttmálin fevnir um tvey ár, og lønarkarmurin er umleið 2,6 prosent

Portørar og ambulansustarvsfólk fáa í dag nýggjan sáttmála við landsstýrið. Tað hendir, eftir at umboð fyri Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðsmannafelag í dag hava undirskrivað ein nýggjan sáttmála.

### Tvey ára sáttmáli

Í stuttum ber semjan við Havnar Arbeiðsmannafelag í sær, at portørar og ambulansustarvsfólk frá 1. oktober í fjør at rokna og tvey ár fram fáa eina lønarhækkan umleið 2,6 prosent.

Partarnir eru harumframt samdir um, at eftirlønargjaldið fer av føstu lønini. Gjaldið, sum arbeiðsgevarin rindar komandi árið, er 10 prosent. Meginparturin av hækkanini fer soleiðis til eftirlønargjaldið.

Portørar og ambulansustarvsfólk arbeiða í tilkallivaktum, og nýggi sáttmálin ásetur, at gjaldið fyri tilkallivakt er 25 prosent av tímalønini á 7. lønarstigi. Eisini kunnu tilkallivaktartímar verða afturbøttir við frítíð soleiðis, at hvør vaktartími verður umroknaður til 25 prosent av vanligum arbeiðstíma.

Sáttmálasamráðingarnar við Havnar Arbeiðsmannafelag hava gingið væl, og báðir partar fegnast um nýggju avtaluna.

### Ein sáttmáli fyri alt økið

Fíggjarmálaráðið fylgir støðugt gongdini á arbeiðsmarknaðinum. Eisini tí partinum, sum umfatar portørar og ambulansustarvsfólk. Fíggjarmálaráðið viðurkennir og hevur staðfest ta sannroynd, at allir portørar og ambulansustarvsfólk eru ikki longur savnað í einum og sama felag.

- Kortini er grundleggjandi, at ein og sami sáttmáli er galdandi fyri økið. Fíggjarmálaráðið tekur ikki dagar ímillum, hvat fakfelag fólk velja at gerast limir í. Hinvegin kann Fíggjarmálaráðið ikki gera fleiri og ymsar sáttmálar um sama arbeiðsøki, stendur í tíðindaskrivinum.